| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 17. apríl 2013 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2013 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2013 tann 17. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 12. apríl 2013 um innkalling til fundar. Fundurin varð av ymiskum orsøkum framskundaður 1 dag frá 18. Til 17. apríl h.á.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Dánjal Vang fór av fundinum, tá ið mál nr. 21/2013 varð til viðgerðar, við tað at nevndar- og aðalfundur varð í Ferðavinnuni í Eysturoy í Tjørnuvík ávikavist kl. kl. 18.00 og 19.00.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 16/2013.**

**Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2014.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Søvn landsins, dagf. 12. desember 2012 um innlatingarfreist fyri at lata inn fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri rakstrarárið 2014.

Mentamálanevndin hevur móttikið uppskot frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 09. apríl 2013 til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri **árið 2014**.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 863.000,00 móti mettum kr. 763.529,00 í 2013, og er sostatt talan um eina hækking upp á kr. 99.471,00, svarandi til 13,0%.

Inntøkurnar av rakstrarstudningi verða mettar til:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 517.800,00 |
| Landskassastudningur | kr. 345.200,00 |
| **Samantals** | **kr. 863.000,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvar við nýggju bókasavnslógina,har býtið millum land og kommunu verður 60% í kommunurnar part og 40 % í Landskassans part. Áðrenn broyting varð gjørd í bókasavnslógini var býtið 40% í kommunurnar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó bert fingið kr. 179.351,00 í landskassastuðli fyri 2012 sjálvt um fíggjarætlanin fyri sama ár hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 747.500,00, og roknskapurin fyri 2012 hevði rakstrarútreiðslur upp á kr. 785.061,19, sum annars skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 314.024,48.

Soleiðis góðkennir Føroya Landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn, sum er størri enn kr. 450.000,00.

Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 345.200,00, sum henda fíggjarætlan leggur upp til, men við staðfesting kr. 179.351,00, so munurin kr. 165.849,00 kemur kommunan sjálv at bera, so lutfalsbýtið kemur helst at verða 79% til kommununa og 21%-um til landskassan.

Ætlanin hevur verið fyri á fundi í Mentamálanevndini tann 09. apríl 2013 og varð samtykt at taka undir við málinum og mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri

2014, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 863.000,00, men heldur 40% av kr. 450.000,00.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna fíggjarætlanina fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2014, sum javnvigar við kr. 863.000,00. (9-0).

**Mál nr. 17/2013**

**Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging til sethúsini á matr. nr. 757 á Toftanesvegi 18 í Fuglafirði hjá Boga Thomsen.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Øyvind Bjerkenæs, dagfest 05. apríl 2013 um byggiloyvi til aftratbygging til sethúsini hjá Boga Thomsen á matr. Nr.757 á Toftanesvegi 18 í Fuglafirði sambært innemdum tekningum.

Av tí at ásetingar um at sethús skulu vera í minsta lagi 2,5 metrar frá grannamarki og verandi hús við ovara húsahorn er 1,7 metrar, so hevur tekniska nevndin viðgjørt hetta mál sum eitt minni frávik til byggisamtyktina. Í hesum sambandi hevru Einar Hansen, sum er eigari av grannaognini í skrivi móttikið 11. apríl 2013 váttað, at hann góðtekur, at bygt verður sambært fyriliggjandi tekningum, har fráleikin í mark verður minni enn 2,5 metrar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 08. apríl 2013, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið sambært fyriliggjandi tekningum, soleiðis at veggurin móti granna verður gjørdur sum brandveggur, og tekningarnar rættaðar samsvarandi hesum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 18/2013**

**Umsókn frá Snorra Jøkladal um byggiloyvi til hjall.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Snorra Jøkladal, dagfest 07. mars 2013 um byggiloyvi til hjall oman fyri sethús hansara á matr. Nr. 143cf á Bøvegi 49 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 08. apríl 2013, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður giviið til bygging sambært viðsendu tekning.

Byggiloyvið er galdandi í 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 19/2013**

**Viðvíkjandi landsvegnum á Hellunum.**

Tekniska nevndin hevur móttikið skriv frá teknisku deildini, dagfest 05. apríl 2013 í sambandi við landsvegin á Hellunum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 08. apríl 2013 og mælir nevndin býráðnum til, at kommunan undir ávísum treytum, sum partarnir kunnu semjast um, yvirtekur tann partin av landsvegnum á Hellunum, sum er millum Spreingisá og lendingina.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 20/2013**

**Viðvíkandi gjaldskránni fyri Fuglafjarðar havn 2009-2013.**

Í sambandi við at gjaldskráin fyri Fuglafjarðar havn fer úr gildi tann 30. Apríl 2013, so hevur arbeiðsbólkurin í sambandi við gjaldskránna, sum í 2009 varð valdur av býráðnum, gjørt uppskot til dagføringar.

Vinnunevndin hevur havt málið til viðgerðar á fundi tann 10. apríl 2013 og ynskir nevndin meira tíð til at viðgera hetta mál.

Tí mælir nevndin býráðnum til, at verandi gjaldskrá verður galdandi, til nýggj gjaldskrá er samtykt av býráðnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá Vinnunevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 21/2013**

**Mál viðvíkjandi hugskotsbólki í sambandi við komandi standmynd í býnum.**

Mentamálanevndin tók á fundi 15. oktober 2012 avgerð um at velja ein hugskotsbólk í sambandi við arbeiði við nýggjari standmynd í Fuglafirði. Nevndin heldur, at tíðin er komin til, at skjøtil eigur at verða lagdur á fyrireikandi arbeiði, eins og gjørt varð við standmyndini av Victori Danielsen, og at hesaferð eigur standmyndin at lýsa eina kvinnu, t.d. kvinna í søgn (Malunar hav), fiskakvinnu, somuleiðis sum øll hugskot eiga at verða viðgjørd í bólkinum.

Nevndin er samd um at velja hesar persónar í bólkin umframt forkvinnuna/formannin í nevndini:
- Øssur Mohr, listamann
- Kristinu Joensen, listarkvinnu

Teldupostar eru sendir til omanfyristandandi, men tíverri hava bæði boðað mentamálanevndini frá, at tey halda hugskotið við standmynd verða frálíkt, men tíverri taka taka tey ikki við vali

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 12. november 2012 og varð avgerð tikin um eftir tilmæli frá forkvinnuni í nevndini, at vali av limum í bólkin verður útsett, til nýggj mentamálanevnd er mannað 01. januar 2013.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 12. februar 2013 og samtykti nevndin einmælt, at formaðurin tosar við Kristinu Joensen og Heðin Kambsdal um bólkin og greiðir frá, um hvat málið snýr seg um.

Síðan seinasta fundin í mentamálanevndini hevur formaðurin tosað við Kristinu Joensen, men beer hon seg við grundgevingum undan. Hann hevur tó ikki tosað við Heðin Kambsdal. Á fundinum varð spurningurin aftur umrøddur, og har varð ma. Nevnt, at fyrrverandi forkvinna í mentamálanevndini Kristina Toftegaard Larsen hevði nevnt á seinasta senasta fundinum hjá fráfarandi nevnd í desember. At hon einki hevði ímóti at taka við vali, um hon fekk fyrispurning um hetta.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 13. mars 2013 og varð avgerð tikin um, at formaðurin tosar við Heðin Kambsdal, um áhugi er fyri hjá honum at verða partur av hugskotsnevndini, somuleiðis sum nevndarliminir eisini kundu hugsað um møguligar persónar við áhuga, sum kundu verið í uppskoti til at mynda hugskotsbólkin.

Formaðurin hevur síðan tosað við Heðin Kambsdal, og sigur hann seg verða sinnaðan at verða partur av hugskotsbólkinum. Somuleiðis hevur hann eisini tosað við Kristinu Toftegaard Larsen, sum eisini vil átaka sær at koma at verða partur av bólkinum, um so verður, at býráðið tekur avgerð um at velja hana í hugskotsbólkin.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundin í mentamálanevndini 09. apríl 2013 og er nevndin samd um at mæla býráðnum til at velja hesar persónar í hugskotsbólkin:

- Heðin Kambsdal, listarmann
- Kristinu Toftegaard Larsen, stjóra og fyrrverandi forkvinnu í mentamálanevndini
- Somuleiðis verður formaðurin í mentamálanevndini eisini limur í bólkinum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0). Sostatt koma Heðin Kambsdal, Kristina Toftegaard Larsen og Árant Berjastein at mynda hugskotsbólkin í sambandi við nýggjari standmynd í býnum.

**Mál nr. 22/2013**

**Mál viðvíkjandi broytan av leigusáttmálanum fyri Kappróðrarneystið.**

Vísandi til fund millum kommununa og ÍF kappróður tann 13. mars 2013, so er staðfest, at ÍF hevur leigusáttmála frá 2007 við kommununa, og ynskti felagið, at sáttmálin varð broyttur, soleiðis at ÍF kappróður framyvir kom at standa sum leigari í staðin fyri ÍF.

Býráðsleiðslan upplýsti á fundinum, at neyðugt varð at leggja broytingina fyri býráðið, sum kom at hava fund 18. apríl, og skuldi fyrisitingin gera sínar rættingar.

Talan er um broytingar av leigara, sí inngang í leigusáttmálanum, og síðan til grein 3, har ískoyti er komið aftrat um, at ikki verður neyðugt hjá felagnum framyvir at søkja um árligan leigustuðul.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna broytingarnar til leigusáttmálan fyri kappróðrarneystið á matr. Nr. 239af á Bakkavegi í Fuglafirði. (8-0).

**<u>Mál nr. 23/2013</u>**

**Ársaðalfundur hjá IRF 2013**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum ”IRF”, dagfestum 21. mars 2013, har boðað verður til ársaðalfundar fríggjadagin 19. apríl 2013 kl. 10.30 á Hotel Hafnia í Tórshavn við dagskrá sambært grein 7 viðtøkum felagsins.

Talan er millum annað um broyting av fíggjarætlanini fyri 2013, uppskoti til fíggjarætlan fyri 2014 og broytan av viðtøkunum hjá felagsskapinum við atliti til møguligar kommunalar útmeldingar og fíggjarviðurskifti, hetta sambært grein 4. Innlendismálaráðið hevur gjørt sína niðurstøðu, sí skriv ráðsins, dagfest 08. apríl 2013.

Fíggjarætlanin fyri 2013 verður bert tillagað og ber ikki eykakostnað við sær fyri kommununa, meðan lagt er upp til at hækkað fíggjarætlanina og harvið kommunalu gjøldini fyri 2014. Skotið verður upp at hækka limagjaldið fyri 2014 við kr. 10,00 pr. íbúgva, soleiðis at ruskgjaldið verður kr. 1.090,00 pr. íbúgva og rottangagjaldið verður kr. 185,00 pr. íbúgva.

Sambært fyriliggjandi so verður kommunan umboðað av 4 býráðslimum, nevniliga Sonna á Horni, Magnus S. Midjord, Dánjali Vang og Sigurði S. Simonsen. Atkvøðurættin hevur Sonni á Horni, borgarstjóri. Fulltrúatváttanin er send IRF við telduposti tann 16. apríl 2013.

**Avgerð:**
Málið varð kunnað og umrøtt á fundinum.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen